Kommunufelagið

Heilsu- og innlendismálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Dagfesting
24. januar 2018

Okkara j.nr.
18/00171-2

Málsviðgeri
Eyðun Christiansen

Tygara j.nr.
17/0079-1

**Viðv. umvæling og umbygging av Klaksvíkar Sjúkrahúsi - heilsumiðstøð**

Heilsu- og innlendismálaráðið hevur 11. januar 2018 sent Kommunufelagnum uppskot til løgtingslóg um at umbyggja og umvæla Klaksvíkar Sjúkrahús. Hoyringsfreistin er sett at vera 24. januar 2018.

Kommunufelagið kann staðfesta, at við hesum uppskoti hevur landsstýrið tikið stig til grundleggjandi broytingar í uppgávu- og ábyrgdarbýtinum millum land og kommunur innan kommunulæknaskipanina.

Verandi uppgávubýti er annars ásett í Løgtingslóg um kommunulæknaskipan, har § 7, stk. 1, ásetir, at “*Kommunurnar útvega og rinda viðtaluhølir við neyðugum innbúgvi, tólum og amboðum til kommunulæknan.”*

Kommunufelagið er á fundum við landsstýrið frammanundan kunnað um, at landið ynskir at yvirtaka omanfyri nevndu skyldur, ið kommunurnar sambært galdandi lóggávu hava. Við lógaruppskotinum kann staðfestast, at landsstýrið er byrjað hesa tilgongd í Norðoyggjum.

Kommunufelagið gongur út frá, at næsta stigið hjá landsstýrinum verður at fara í samráðingar við onnur øki og kommunur í landinum um broytta uppgávubýtið millum geirarnar, samsvarandi tí leisti, sum nú er lagdur fyri dagin.

Vegna
Kommunufelagið

Dennis Holm
Formaður

Eyðun Christiansen
Stjóri

**R. C. Effersøesgøta 26 · FO-100 Tórshavn**

**Tlf. +298 302480 · T-postur: kf@kf.fo · Heimasíða: www.kf.fo**